# Havnarmenn grammir eftir grundøkjum norðanfyri



*Eiðis kommuna lýst við tøkum grundøkjum. Hesi vórðu seld beinanvegin*

**Svínáir:** Tað gekk ikki long tíð, frá tí at Eiðis kommuna lýsti við grundøkjunum, til tey øll vóru seld.

Tað kom helst óvart á mong, tá kommunan bjóðaði fleiri grundøkir til sølu fyri ein kostnað, sum kundi tykjast sera rímiligur í mun til prísin aðrastaðni.

Grundøkini vóru partar av eini útstykking, sum varð framd fyri mongum árum síðani í Svínáum, men tað gekst kortini illa at sleppa av við tey.

Støddin á grundøkjunum var um 500 fermetrar og prísurin einans 20.000 kr. Og hetta skapti stóran áhuga millum manna.

Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði upplýsir, at hesi grundøkini vórðu seld beinanvegin.

Tað sum kanska er mest áhugavert í hesum er, at fleiri av keyparunum vóru úr Suðurstreymoy.

**sb.**

# Fá fremmand fiskifør í okkara sjóøki

**Fiskivinna:** Tey fremmandu fiskiførini hava ikki verið so mong í tali henda seinasta mánaðin.

Eitt yvirlit yvir útlendsku veiðuna vísir, at bert skip úr fýra londum hava fiskað í okkara sjóøki.

Talan er her um skip úr Bretlandi, Fraklandi, Noregi og Russlandi sum íalt hava havt 464 fiskidagar í sjóøkinum.

Hesi hava íalt veitt 11.200 tons í januar mánaði. Ikki óvæntað er størsta nøgdin svartkjaftur, sum russar veiða einsamallir.

**sb.**

# Reglugerð fyri djórahald

**Tórshavn:** 1. januar í ár kom nýggj reglugerð í gildi um flogfenaðhald í Tórshavnar kommunu.

Endamálið við reglugerðini er at tryggja, at flogfenaðhald ikki elvir til ampa fyri grannar og onnur. Sambært reglugerðini skulu hesa verða spurd til ráðs, áðrenn ein fer undir hetta.

Reglugerðin lýsir m.a. krøv, ið verða sett til búr, garðar, girðingar og hús, ið verða nýtt til flogfenað sum høsn, gæs, dunnur, kalkunur, dúgvur og annan fugl.

**sb.**

# Trillan trillar kring landið við úrvali sínum

**Fyri tveimum mánaðum síðani seldi Ruth Laksáfoss handil sín í Klaksvík. Nýggi eigarin er Ása Hentze við handli sínum Trillan á Tvøroyri. Hon hevur sett sær fyri at halda fram í sama spori sum gamli eigarin: Kundarnir kring landið skulu ikki forsømast**

HANDIL



*Ása Hentze heldur nú fram eftir sama leisti sum áður – við framsýningum av undirklæðum og øðrum kring landið. Her vitjar hon í ungmannafelagshúsinum í Skopun*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Skopun:** Tað er ein heldur øðrvísi framsýning, sum er á skránni í ungmannafelagshúsinum henda dagin.

Ein týsdag í januar mánaði fingu sandoyingar brádliga ein møguleika at síggja eina framsýning av undirklæðum og øðrum tílíkum til konufólk.

Ása Hentze úr Trongisvági hevði nevniliga sett sær fyri at halda fram á somu leið, sum undangongukvinnan Ruth Laksáfoss hevur hildið í langa tíð.

Tær báðar kendust nakað frammanundan og prátaðu ofta saman í telefon. Ta einu ferðina fall so prátið inn á handilin hjá Ruth í Klaksvík, sum var lýstur til sølu.

Henda samtalan endaði við at Ása keypti handilin hjá Ruth, og selur nú vørurnar á Tvøroyri, men eisini við vitjan kring landið.

– Vit hava nógvar kundar kring landið, og tí er neyðugt hjá mær at vitja teir av og á og soleiðis halda sambandið við teir viðlíka.

– Hetta er so ein máti at hitta sandoyingar uppá, sigur Ása.

Hóast fólkatalið á Sandoynni er avmarkað, so lat Ása væl at vitjanini á framsýning hennara.

– Her hava verið fólk í øllum aldrum – frá teimum 13 ára gomlu og heilt upp í eina konu sum var nærri teimum 80 árunum, sigur hon.

## Vitjar kring landið

Tað eru nú farnir meiri enn tveir mánaðir síðani Ása og Trillan á Tvøroyri tók yvir vørurnar og handilin hjá Ruth í Klaksvík.

Á mangan hátt er talan nú um tað øvugta arbeiðið hjá Ásu í mun til gamla eigaran, - ella ta øvugtu leiðina.

Ruth Laksáfoss gjørdi nógv av at vitja kring landið fyri at vísa fram vørur sínar. Og í hesum sambandi kom hon eisini við millumbilum á Tvøroyri.

– Nú eri eg so farin hinvegin. Eg eri nú á Sandoynni og fari síðani vestur til Sørvágs og til Klaksvíkar.

– Men kundar okkara eru kring alt landið. Tí fari eg so seinni til Havnar og inn í Eysturoynna, sigur Ása.

Tá vit vitjaðu hesa framsýningina hevði hon verið opin í ein dag í Skopun, og hon læt sera væl at undirtøkuni millum sandoyingar.

– Fólkið her á Sandoynni, eru positiv, fitt og ótrúliga blíð, sigur hon.

## Mótabevíst ungfólk

Kundarnir hjá Trilluni eru í øllum aldrum – frá teimum ungu til tær tilkomnu kvinnurnar, eins og vitjanirnar á Sandoynni eisini bera boð um.

Tí er neyðugt hjá Ásu at liggja inni við teimum vørunum, sum hóska seg til tann einstaka aldursbólkin.

– Eg síggi tað serliga væl hjá teimum ungu. Tey koma inn og eru bæði málbevíst og mótabevíst um undirklæðini.

– Ja, tað er bara so, at tey vita akkurát hvat tey vilja hava fatur á, sigur Ása.

# 22 legur á Zarepta

**Vatnsoyrar:** Aftur í ár bjóðar leguhúsið Zarepta til ein hóp av tiltøkum bæði fyri børn, ung og tilkomin.

Fleiri samkomur hava longu í ár gjørt brúk hesum leguhúsinum, sum nú hevur sløk 40 ár á baki. Eitt vikuskifti herfyri vóru eini 200 ungfólk úr samomuni Ebenezer í Havn á legu her.

Sjálv leguskráin byrjar kortini í mai mánaði, tá ein lega verður fyri brekað. Og soleiðis verður hildið á restina av árinum við ymiskum legum og øðrum tiltøkum.

Íalt verða 22 legur, skeið og stevnur fyriskipað í ár. Tær flestu verða í summar, tá tær vælumtóktu summarlegurnar aftur verða á skránni.

Annars kann sigast, at í 1965 byrjaði Brynleif Hansen saman og onnur við barnalegum við Áir, har tær vóru hildnar í tvey ár. Um somu tíð var farið at leita eftir øðrum hóskandi staði til legur, og opnaðist møguleikin í Vatnsoyrum.

Um heystið í 1965 var øki í Vatnsoyrum keypt, og á sumri í 1967 var hús bygt liðugt til endamálið.

Zarepta er síðan bygt út, bæði við bygningum og frítíðarmøguleikum. Í 1976 var norðara húsið bygt.

Staðið er væl egnað, og hava mong túsund føroysk børn og ung verið á legum hesi árini.

**sb.**